# Dómadagsmaskinan sett í gongd

Ein roynd at eftirgera Big Bang er byrjað í Sveis í morgun. Klokkan hálvgum níggju trýstu granskararnir í CERN-verkætlanini á knøttin, sum byrjaði royndina, um eftir ætlanini skal siga vísindini, hvussu alheimurin varð til. Royndin verður gjørd í einum 27 kilometrar longum tunli 90 metrar undir jørð á markinum millum Sveis og Frakland. Nøkur vísindafólk siga, at royndin kann gera eitt stórt sokallað "svart hol", og at Jørðin kann hvørva í tí. Teir flestu granskararnir siga hinvegin, at vandin er sera, sera lítil.



# Døglingar í Hvalba

Fýra døglingar løgdu beinini á sandinum í Hvalba fyrrapartin í gjár. Tað skrivar Suðuroyarportalurin. Sum skilst vóru døglingarnir eitt sindur størri enn teir, sum løgdu beinini í Sandvík tann 20. august. Umleið seks tons av tvøsti fingust burtur úr teimum fýra døglingunum, og tað bleiv býtt til borgararnar í Hvalbiar sókn.

# smuglarar tiknir



*- Sum vit skilja á lagnum er, er prísurin farin úr umleið 250 krónum til umleið 350 krónur fyri grammið av hassji. Vit meta sjálvir, at tað ikki er eftirspurningurin, sum er vaksin, men heldur útboðið, sum er minkað, sigur Brynjer Johannesen frá narkopolitinum*



*Tá ið fólk smugla innvortis, eru tað vanliga hítir ella »kinderegg«, ið vera nýtt. Í sær sjálvum er tað ikki so vandamikið, men trupulleikin er tá hol kemur á*

- Fólk eru farin at smugla rættiliga nógv innvortis. Tað ger rúsevnini torførari hjá okkum at finna. Men vit hava tikið fleiri, sum hundurin hevur markera sterkt við, síðani hava vit koyrt tey í røntgu ella skannara og har funnið rúsevnir inni í fólkum, sum vit ikki hava funnið nakað uppiá.

## Álvarligar fylgjur

Tá ið mann smuglar innvortis, er tað vanliga hítir ella »kinderegg«, ið vera nýtt. Í sær sjálvum er tað ikki so vandamikið, men trupulleikin er tá hol kemur á.

- Tað, sum hendur, er at mann fær eina yvirdosis, tað veldst sjálvandi um mongdirnar, men í ringasta føri doyr mann av tí. Sjúkueyðkennini eru tey somu fyri øll rúsevnir, men fylgjurnar valdast altíð mongdirnar. Mest vanligu eyðkennini eru krampar, at fólk gevast at anda, at hjartarútman gerst óreglulig og yvirhiting, sigur Elin Jensen, narkosulækni á Landssjúkrahúsinum.

Tað vil við øðrum orðum siga, at tað ikki bara er vandi fyri fongsulsrevsing, men eisini veruligur deyðsvandi, tá onkur smuglar rúsevnir innvortis.

## Sølumynstrið er broytt

Samstundis sum smuglimynstrið er broytt, er sølumynstrið eisini broytt mundandi, sambært løgregluni.

- Fyrr hava vit onkuntíð havt fólk aftanfyri alt – sokallaðir bakmenn – sum hava vunnið nógvan pening við at innflyta nógv hassj, soleiðis fata vit tað ikki at vera í dag. Heldur er talan um, at onkur hevur verið uttanlands, og har hevur keypt nøkur gramm, sum tey síðani selja í einum umhvørvið tey finna passandi, sigur Brynjer Johannesen frá narkopolitinum.

So talan er ikki um skipaðan kriminalitet, sum onkuntíð fyrr hevur verið, men heldur smáseljarar, ið vinna pening til sína egnu nýtslu av rúsevnum. Tað er sama fatan sum tollvaldið hevur.

- Grundin til at fólk halda tað vera so nógv rúsevnir, er at vit sjálvandi ikki fanga øll, og tí kann tað henda, at til dømis eini 20 gramm av hassji koma í umfar eitt vikuskifti og tað er nakað, fólk leggja til merkis, men tað merkir bara, at onkur einstakur er komin ígjøgnum, sigur Brynjer Johannesen, narkopolitistur.

Bæði frá tollvaldinum og løgregluni fortelja teir, at mongdin av rúsevnum ikki er vaksin seinastu árini, men heldur eru sterkaru rúsevnini, so sum amfetamin og kokain – saman við tablettum – vorðin meira vanlig enn tey fyrr hava verið.